## 235 fiskar undir Føroyum

Á fyrsta sinni kemur út upprunaføroysk bók um allan tann fisk, ið er skrásettur at liva undir Føroyum. Í hesum slóðbrótandi verki hevur Rógvi Mouritsen sum fiskimaður og biolog-assistentur á Fiskirannsóknarstovuni savnað okkara vitan um fiskasløg í føroyskum sjóøki. Tilsamans 235 fiskasløg eru skipað í hóp, ætt og slekt í nýggju bókini Fiskar undir Føroyum, sum Føroya Skúlabókagrunnur og Fiskirannsóknarstovan geva út. Útgevari er Føroya Skúlabókagrunnur, har Niels Petersen hevur havt ritstjórnina um hendi. Fiskar undir Føroyum snýr seg um, hvørji fiskasløg eru við Føroyar, teirra føroyska navn og teirra vísindaliga navn, og eisini eru nøvnini, sum nøkur av grannalondunum brúka um ávísa fiskin, við í bókini. Mynd er av hvørjum fiskaslag, og sagt er frá um teirra útsjónd, hvussu víða tey liva, um støðd, lit og dýpi og teirra týdning fyri fiskiskapin.




## Íslendingar inn í Formel1

Íslendska íløgufelagið, Baugur, sum millum annað hevur keypt Magasin du Nord, FL Group og Keops, hevur havt sínar trupulleikar at stríðast við seinastu tíðina. Tað heldur tó ikki leiðsluni frá at hugsa um nýggjar íløgur, og nú sigst Baugur vera í holt við at keypa seg inn í Williams, ið er eitt av meira siðvandu Formel 1 liðunum. Framman undan hesum eigur Baugur leikufyritøkuna Hamleys, sum telist millum sponsorarnar hjá Williams.

## Upptøkur gjørdar í Noregi

Gylta Kumpassin er ein stórsligin ævintýrfilmur, sum er bygdur á fyrstu bókina í tríverkini hjá Philip Pullman, Myrkursins Frumevni.

Í fyrsta filminum hitta vit forvitnu gentuna Lyra, sum býr á lærdum háskúla í Oxford, har rektarin og professorarnir á skúlanum taka sær av henni.

Pápabeiggi hennara, Lord Asriel, ger spennandi ferðir til Arktis, og hann hevur eftir øllum at døma funnið okkurt heilt spennandi á einari ferð hagar. Men tað er eisini vandi á ferð, tí børn hvørva úr Oxford, og tað eru altíð børn hjá fátøkum foreldrum, sum verða tikin. Men hvør er tað, sum tekur børnini, og hevur tað nakað at gera við ferðirnar hjá pápabeiggjanum til Arktis.

Lyra heldur seg vita, hvussu alt hongur saman, og hon ger av at gera eina ferð norður eftir, men tað er ikki bara sum at siga tað. Hon fer inn í eina verð, sum fólk ikki vanliga uppliva.

Filmurin er lutvíst tikin upp í Noregi – í Bergen og á Svalbard.

Tað er Chris Weitz, sum hevur verið leikstjóri, og hann hevur havt nógvar kendar sjónleikarar at spæla leiklutirnar í filminum.

Millum høvuðsleikararnar í filminum eru Nicole Kidman og Daniel Craig, sum er tann nýggi James Bond. Gentan Lyra verður spæld av Dakota Blue Richards, sum ongantíð áður hevur spælt í biograffilmi. Aðrir leikarar í filminum eru Ian McKellan, Eva Green, Sam Elliot, Kristin Scott Thomas og Kathy Bates.

Filmurin er slakar tveir tímar til longdar og verður frumsýndur í Havnar Bio fríggjakvøldið.



*Gentan Lyra er høvuðsleikari í filminum, og hon fær eina gylta kumpass við sær á ferðina norður til Arktis*

# Filmur lagdur und

**Filmurin Gylta Kumpassin, sum verður frumsýndur í Føroyum í morgin, verður lagdur undir at verða ein grov manipulatión av børnum og ungum. - Hetta minnir mest um heilavask, og børnini verða leidd aftur í reinan heiðinskap, sigur kunningarleiðarin hjá katólsku kirkjuni í Danmark. Føroyskur serfrøðingur í talgildum samskifti heldur, at børn hava góð filtur til at hyggja eftir filmum og at spæla telduspøl, sum kunnu tykjast ógvuslig**



**FILMUR**
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað eru ikki smávegis ákærur, sum í hesum døgum regna niður yvir stórfilmin The Golden Compass, ið verður frumsýndur kring allan heimin í morgin. Teologar uttanlands hølva filmin av, tí hann skal verða manipulerandi og hava til endamáls at undirgrava kristindómin við stórsligni num undirhaldi, sum børnini og tey ungu eru verjuleys ímóti.

Ein av teimum, sum finnist harðliga at filminum, er Iben Tranholm, teologur og kunningarleiðari hjá katólsku kirkjuni í Danmark.

- Gylta Kumpassin er ein filmur í eini røð av filmum, har kristindómurin stendur fyri skotum, og vit hava áður upplivað filmarnar um Harry Potter og Da Vinci Code. Gylta Kumpassin verður marknaðarførdur sum spennandi og undirhaldandi filmur til børn og ung, men endamálið er at seta kristindómin í ringt ljós, sigur hon við Sosialin.

- Rithøvundin av Gyltu Kumpassini, Philip Pullman, hevur sjálvur sagt, at bókin hevur til endamáls at undirgrava kristindómin.

### Grov manipulatión

Gylta Kumpassin verður frumsýndur í Havnar Bio fríggjakvøldið, og talan er um eina heimspremieru. Gylta Kumpassin ein stórfilmur úr Hollywood, sum hevur kostað umleið eina milliard krónur at framleiða. Kendir sjónleikarar spæla við í filminum, og roknað verður við, at filmurin fer at savna nógv fólk í biohøllunum kring heimin undan jólum.

– Filmurin er ein grov manipulatión, og børn og ung verða heilavaskað við bæði ateismu og okkultismu. Tey kristnu hava ofta verið løgd undir at indoktrinera skúlabørn, men tað er reinur barnamatur aftur ímóti tí, sum børn og ung verða útsett fyri í hesum filminum og í dagsins undirhaldi annars, sigur Iben Tranholm.

– Gylta Kumpassin er ein stórsligin filmur, sum hevur lætt spæl við at ávirka átrúnaðin hjá børnunum. Børn klára als ikki at standa ímóti slíkum filmi, sum førur tey aftur í reinan heiðinskap við trøllum, heksum, illum andum og einum generelt myrkum boðskapi. Og tað tykist, sum at filmarnir ofta